**Bjørt Samuelsen**
**Ingilín Didriksen Strøm**
**Bjarni Kárason Petersen**
**Hervør Pálsdóttir**
**Beinta Løwe Jacobsen**
**Djóni Nolsøe Joensen**
**Ruth Vang**
**Jóhannis Joensen**

Løgtingið

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)** (Samkynd verða javnsett við hinskynd foreldur)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)** (Samkynd verða javnsett við hinskynd foreldur)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 7. mai 2019 verður aftan á § 4 sett:

"**§ 4 a**. Í teimum førum, har talan er um tvey av sama kyni, ið hava fingið barn saman, verða reglurnar eftir hesi lóg tulkaðar eftir somu treytum, sum hjá hinskyndum foreldrum. Treytirnar fyri at fáa rættindi sambært hesi lóg eru, at tey vátta fyri Barsilsskipanini, at tey eru gift ella liva í parlagi og eru sambúgvandi. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skjalprógvan, og hvussu rættindini sbrt. hesi lóg verða býtt."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021, og er galdandi fyri samkynd pør, hvørs børn eru fødd ella ættleidd sama dag ella seinni.

**Almennar viðmerkingar**

Uppskotið hevur til endamáls at javnseta rættin hjá samkyndum foreldrum til barsilsfarloyvi og barsilspening. Og at javnseta rættin hjá øllum børnum til at hava møguleika fyri at hava bæði foreldrini um seg í barsilstíðini.

Støðan er soleiðis í dag, at eitt samkynt par, sum fær eitt barn, ikki hevur javnsettan rætt til barsilsfarloyvi og -útgjald. Sum dømi kann nevnast, at hóast tvær kvinnur eru giftar, og fáa eitt barn saman, so verður tann, sum ber barnið, viðfarin eftir reglunum í barsilsskipanini fyri støk. Onnur mamman fær sostatt alt barsilsfarloyvið ímeðan hin einki fær. Fleiri samkynd foreldur og børn teirra eru fyri hesum mismuni í Føroyum.

Tíðin saman við pinkubarninum er ein hin dýrmætasta yvirhøvur. Fyri barnið og fyri foreldrini. Tað eigur at vera ein sjálvfylgja, at barnið fyrstu árini av lívi sínum fær møguleika at vera nógv saman við foreldrum sínum. Tí tað er hesa tíðina, tryggleikin og tøttu bondini fyri restina av lívinum verða knýtt.

Í 2016 fingu samkynd rætt til at giftast borgarliga í Føroyum. Tað er sjálvsagt neyðugt, at lóggáva, sum framvegis ger mun á samkyndum og hinskyndum hjúnum, og børnum teirra, verður dagførd.

Her verður eitt nú hugsað um lóggávu kring foreldrarætt og rættindi hjá børnum til bæði foreldur. Broytingin í barsilslógini fevnir einans um rættin til barsil við løn og til útgjald av barsilspeningi.

Skotið verður upp, at samkynd pør skulu kunna verða fevnd av barsilsskipanini, hóast lóggávan og viðurskiftini kring formliga staðfesting av foreldrarættinum enn ikki eru komin upp á pláss. Tað merkir, at samkynda parið yvirfyri myndugleikunum skal skjalprógva, at talan er um eitt felags barn, og at har ikki er nakar annar, sum hevur lógligan rætt til faðir- ella móðurskap at barninum, og harvið eisini til rættindi sambært barsilslógini.

Her er sostatt talan um føri, har eingin annar kann staðfestast sum foreldur.

Væntandi eru fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum sera avmarkaðar. Talan er um fáar familjur, og í verandi støðu fær burðarmamman longu fulla barsilskvotu.

**Serligar viðmerkingar**

Til § 1:

Í teimum førum, har foreldur eru av sama kyni, verða reglurnar eftir barsilslógini tulkaðar eftir somu treytum, sum hjá hinskyndum foreldrum. Hetta merkir, at pør av sama kyni, ið antin eru gift ella liva í parlagi og eru sambúgvandi, bæði fáa rættindi sambært barsilslógini.

Treytirnar fyri at fáa rættindi sambært hesi lóg eru, umframt at talan skal vera um at fáa eitt barn saman, at tey skulu vátta fyri Barsilsskipanini, at tey eru gift ella liva í parlagi og eru sambúgvandi.

Talan skal vera um, at tey fáa barn saman. Hetta merkir, at tey í felag hava tikið avgerð um at fáa sær barn og vera um tað, hóast ein møguligur foreldramyndugleiki formliga ikki er upp á pláss. Tað kann taka 2,5 ár at fáa formliga ættleiðing uppá pláss. Og talan er um føri, har eingin annar kann gera rættarligt krav upp á barnið. Heimildin at fáa rættindi sambært hesum uppskoti er, at eingin annar hevur rættarligt krav upp á somu rættindi, ið barsilslógin heimilar.

Nýggja ásetingin ásetir somuleiðis, at landsstýrismaðurin skal gera nærri reglur um skjalprógvan fyri, at tey, ið fáa sær barn saman, eru gift ella liva saman í parlagi, umframt at tey skulu vera sambúgvandi.

Gift pør hava vanliga í vígslubrævinum eitt skjalprógv, meðan onnur krøv um skjalprógv kunnu verða sett fyri, hvat tað er at vera í parlagi. At vera í parlagi, merkir, at tvey fólk liva saman sum par. At vera sambúgvandi merkir, at tey skulu búgva saman. Eitt nú kann landsfólkayvirlitið vera ein háttur at prógva, hvar tú býrt. Harnæst ber til at skjalprógva við at skriva undir skjal, at viðkomandi búgva á somu adressu.

Landsstýrismaðurin skal somuleiðis áseta nærri reglur um, hvussu rættindi sambært hesi lóg verða býtt, hvør skal hava rættindi sum mamma og sum pápi sambært ásetingunum í barsilslógini. Her verður hugsað um í teimum førum, har tað ikki beinleiðis er greitt, hvør er at tulka sum mamma, og

hvør er at tulka sum pápi sambært barsilslógini. Dømi kann vera er, tá tvey av sama kyni ættleiða eitt barn.

Við hesi broyting verða rættindini hjá samkyndum, javnsett við tey, ið hinskynd foreldur longu í dag hava í barsilslógini.

Til § 2:
Gildiskomuáseting.
Lógin fær gildi 1. januar 2021 og er galdandi fyri samkynd pør, hvørs børn eru fødd ella ættleidd sama dag ella seinni.

**Á Løgtingi, 20. oktober 2020**

Bjørt Samuelsen Ingilín Didriksen Strøm Bjarni Kárason Petersen

Hervør Pálsdóttir Djóni Nolsøe Joensen

Beinta Løwe Jacobsen Ruth Vang Jóhannis Joensen